# Ansa eftir livandi ljósum



Desember er ein hugnaligur mánaði. Familjan er í fokus, hugnin heima er so góður sum hann kann verða, jólatrøini og jólapynta seta dám á, og nógv er at uppliva bæði heima og úti.

Men desember er eisini ein vandamikil mánaði. Tað vísa uppgerðir yvir eitt nú eldar í desember.

Í Danmark hava tey gjørt upp, at ein vikan við jóladøgunum er seks ferðir so vandamikil sum ein hvør onnur vika um heystið ella veturin. Og í vikuni kring nýggjárið eru átta ferðir so nógvir eldir í Danmark, sum aðrar miðal vikur í árinum.

Í flestu førum er talan um minni eld, sum tað eydnast at sløkkja, áðrenn sløkkiliðið verða boðsend, men í triðja hvørjum føri veðrur ringt 112 fyri at fáa hjálp.

Høvuðsorsøkin til teir mongu eldarnar er, at so nógv livandi ljós verða brúkt í desember mánaði. Stearinljósini seta dám á, men tey kunnu eisini verða vandamikil, um tað ikki verður ansað eftir teimum. Ljós í sambandi við dekoratiónir og adventskransar kunnu verða sannar brandbumbur, tí eftir einari lítlari løtu kann veruliga festa í húsið.

Nøkur av hyggjuráðunum í sambandi við livandi ljós eru, at tú mást ongantíð fara úr einum rúmi uttan at sløkkja ljósini. Børn og djór mugu ikki verða einsamøll við livandi ljósum, ljósini skulu helst standa høgt, tey mugu ikki standa á sjónvarpi, útvarpstólum ella líkandi, og tey mugu heldur ikki verða í nánd av gardinum, bókum ella hillum. Tú kanst eisini hava eina kannu av vatni standandi klára og umráðandi er eisini at brúka roykalarmar í húsinum.


























